# Klintrarar í hingu í línu á Landssjúkrahúsinum

**Í sambandi við Listastevnu Føroya var ein heldur óvanlig framsýning á Landssjúkrahúsinum seinasta leygardag. Fimm listfimleikarar hingu í hvør sínari línu og framførdu ein leik á útveggjunum á Landssjúkrahúsinum**



*Listfimleikabólkurin Scarabeus sýnir síni kynstur á Landssjúkrahúsinum*

LISTFIMLEIKUR
*Orð: Magnus Gunnarsson*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Nógv fólk var samankomið á økinum uttan fyri Landssjúkrahúsið seinasta leygardag, tá listfimleikarar úr enska bólkinum Scarabeus hingu í línum og gjørdu ymisk kynstur á útveggjunum á Landssjúkrahúsinum. Stórir hátalarar vóru settir upp, og tey fimm fólkini hingu í hvør sínari línu og svingaðu til tónleikin.

Listfimleikabólkurin Scarabeus hevur heimstað í London. Hesir listfimleikarar vitja í ymiskum býum um allan heimin og sýna síni kynstur fram á stórum bygningum. Vanliga gera tey ein sjónleik, sum sigur nakað um tann bygningin, har tey framføra. Í hesum føri framførdu tey ein sjónleik, sum tey høvdu gjørt um Landssjúkrahúsið. Leikurin æt Arboreal, sum merkir: »tann sum býr uppi í trøðunum«, undirheitið á leikinum var »lívið á eggini«. Tey leiktu á hvør sínari síðu á bygninginum og eggin var í hesum føri tað eina horni á Landssjúkrahúsinum.

Tey spældu eisini ein leik um eina skurðviðgerð á tí niðara takinum á Landssjúkrahúsinum.

Tað eru ikki allir bygningar, sum eru egnaðir til slíkar framførslur. Tá tey skulu velja ein bygning til eina slíka framførslu, er tað fyri tað fyrsta neyðugt, at bygningurin er soleiðis háttaður, at línurnar kunnu bindast á ein tryggan hátt og øll onnur trygdarviðurskifti eru í lagi. Eisini skal tað vera ein bygningur, sum er gjørdur úr tilfari, sum ikki tekur skaða av tí, sum tey gera. Tað vísti seg at Landssjúkrahúsið var væl egnað til hetta endamál.

Listfimleikabólkurin Scarabeus framførir eisini á øðrum støðum sum t.d. uppi í mastrum á seglskipum o.l.

Oddvá Nattestad, samskipari av Listastevnu Føroya, og listfimleikabólkurin Scarabeus, skipaðu fyri hesi framførslu við loyvi frá leiðsluni á Landssjúkrahúsinum.





*Vónandi líða tey ikki av hæddarrædslu*



*Tey fimm fólkini hingu í hvør sínari línu og svingaðu til tónleikin*





# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Árni Helmsdal 50 ár

Sunnudagin 17. august fór Árni Helmsdal í Odense um tey hálvt hundrað. Mong munnu komast við navnið, sum í mong ár hevur skrivað kveikjandi greinar við andaligum boðskapi á baksíðuni á Oyggjatíðindum.

Árni Helmsdal er havnarmaður. Foreldrini vóru Olivia og Mikkjal Helmsdal. Hon var úr Miðvági, og hann var úr Leynum. Eftir kríggið búsettust tey í høvuðsstaðnum, og tey fingu seks børn: Kári, Tordis, Ingi, Finnur, Árni og Jón, sum druknaði í ánni dygst við húsini, har tey búðu, í 1961, tá ið hann var knappliga tvey ára gamal.

Árni gekk í realskúla í Hoydølum, og hann leyk studentsprógv í Sorø. Árni fór undir víðari lestur í Århus, har hann tók læraraprógv í 1980. Hann var í nøkur ár lærari á kristnum frískúla í Odense, og síðani fór hann undir víðari lestur. Í Odense hevur Árni tikið HD, og hann hevur í mong ár arbeitt innanfyri A kassarnar, har hann hevur fingist við at vegleiða teimum, sum hava verið arbeiðsleys, soleiðis at tey kunnu finna innihald og meining við gerandisdegnum, um tey so aftur eru komin á arbeiðsmarknaðin ella ikki.



Árni er giftur við Vibeke. Hon er ættað úr Brønshøj. Mamman var úr Leirvík. Vibeke og Árni gingu á lærarask úla í Århus í senn, og Vibeke er framvegis lærari. Tey eiga fýra børn: Andreas, Amalia, Asbjørn og Annfinn.

Árni hevur verið virkin í kristiligum arbeiði øll útisetaárini. Hann hevur havt serligt hjartalag fyri ungum føroyngum, sum eru komnir til Århus og Odense at lesa og læra. Hann hevur havt ábyrgdina av bíbliutímum fyri føroyingum, og tey eru mong, sum kunnu skriva undir uppá, at Árni hevur sýnt satt hirðahjarta fyri teimum, eisini eftir at tey aftur eru flutt til Føroya.

Árni hevur altíð gjørt nógv við at skriva. Umframt teigin í Oyggjatíðindum, sum hevur verið ikki sørt originalur, men sum altíð hevur havt serligan boðskap, hevur hann luttikið nógv í almenna orðaskiftinum, m.a. við lesarabrøvum í donsku pressuni. Hann hevur skrivað um føroysk viðurskifti, um kristilig viðurskifti, og hann hevur ikki minst kent ábyrgd fyri at verja tey minni mentu og m.a. víst á týdningin av, at tey, sum frá Skaparans hond eru brekað, fáa sømilig kor og verða mett og viðfarin, sum tað sømir seg øllum menniskjum. Áhugin fyri hesum síðst nevnda man ikki minst vera komin av, at næstyngsti sonurin, Asbjørn, er mongol.

Árni hevur verið óførur brævskrivari. Páskabrøvini hava verið tiltikin. Tey hava verið rúgvismikil, og tey hava verið djúp. Árni er føroyingur í Danmark, og hann hevur stóran áhuga fyri øllun tí, sum er føroyskt og hevur við Føroyar at gera. Hann og familjan hava ofta vitja hendanvegin, og ivaleyst eru tey mong, sum heilsa honum, nú hann er farin um tey fimmti.

## Dagurin

**19. august. Sebaldus.** Sigst at hava verið guðrøkin danskur kongssonur, sum var trúlovaður franskari prinsessu. Men hann fór frá henni og gav seg í kleystur í Nürnberg, har hann doyði í hvussu so er fyri ár 1070.

## 30 ár síðan Kubatrolararnir komu

Um miðjan August 1973 komu 9 hekkutrolaar til landið, sum Skipafelagið Føroyar hevði keypt úr Cuba. Trolararnir vóru 130 føtur langir og 8,2 metrar breiðir. Teir eru keyptir frá Eysturtýsku skipasmiðjuni, sum eisini bygdi farmaskipini, sum Skipafelagið keypti í 1972. Prísurin var umleið 8 mill. krónur fyri allar trolararnar. Trolararnir vóru bygdir í 1970-71 til Kubansku myndugleikarnar, men vórðu ongantíð yvirtiknir frá skipasmiðjuni.

55 mans vórðu sendir eftir skipanum, og høvdu teir góðar 3 vikur um at sigla tey heim úr Havana.

Í vinstra horni á myndini sæst stjórin á Skipafelagnum Føroyar, Oddur Niclasen.

Kelda: Myndaárbókin "árið ið fór" 1973




*Kubatrolararnir á Molanum í Havn í 1973, fremst liggur Trastur*